# Orgasma er ein

**Øll hava rætt til eitt ríkt kynslív. Men tað kemur ikki av sær sjálvum. Tað krevur, at vit opna okkum og tora at vera meiri *kroppur* og minni *høvd*. Tí tað mest attraktiva fyri eitt mannfólk er ein opin kvinna, sum torir at liva við og í sínum kroppi. Tað var ein høvuðsboðskapur hjá danska sexologinum Joan Ørting framman fyri 500 føroyskum kvinnum á Hotel Føroyum leygarkvøldið. Bert spell, at tey fimm til tíggju mannfólkini ikki vóru fleiri. Tí mannfólk fingu eisini nøkur borgarlig orð um ikki at levera í songini...**



*Danski sexologurin Joan Ørting illustrerar eitt blow-job framman fyri 500 kvinnum á Hotel Føroyum. - Tá maðurin kemur heim eftir ein strævnan arbeiðsdag, eiga vit kvinnur av og á at fara frá frikadellunum á pannuni og út í durin at geva honum eina heita og erotisku móttøku, sigur Joan Ørting, sum tosaði um alt frá analsex, oralsex og vátar orgasmur til sjálvsálit, opinleika og óndu ringrásina, tá romantikkur, kynshugur og kærleiki er fánað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

REPORTAGA
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

- Uha uha! Tá Jógvan kemur heim, skal hann bara vænta sær!

Klokkan er hálvgum tólv, og tveir tíma langi fyrilesturin hjá reyðhærda sexsjarmitrøllinum úr Keypmannahavn, Joan Ørting, er júst liðugur. Í gongini og á parkeringsplássinum á Hotel Føroyum standa kvinnur í øllum aldri og eftirmeta tey saftigu triksini, sum Joan hevur lagt teimum eina við at fara heim at royna. Summar tykjast hálvgum yvirgearaðar av øllum prátinum um vátar orgasmur, sproytiorgasmur, tríkantar, g-punkt og i-punkt (ella hvat hesi ymsu punktini nú eita). Tær allar flestu, eg tosi við, lata væl at fyrilestrinum. Øll – uttan ein skeptisk vinkona – venda tummilin uppeftir. Joan Ørting leveraði vøruna.

Og Jógvan? Ja, hann kann bara vænta sær! Tað eru í øllum førum tey seinastu orðini, eg av misgáum hoyri úr mannamúgvuni, ella rættari sagt kvinnumúgvuni, tá eg fari av Hotel Føroyum um hálvgum tólv tíðina.

### Uppsangur til mannfólk

Tiltakið byrjar kl. 20.00, og einar 500 kvinnur sita í stóra og stúgvandi fulla salinum og bíða. Og tá Joan Ørting seinni trínur á pall og spyr, hvussu eftir mannfólkunum, koma millum fimm og tíggju hendur til sjóndar. Og tað er spell, at so lítið testosteron er til staðar. Tí tað vísir seg, at innihaldið í fyrilestrinum hjá fólkakæra danska sexologinum er eins nógv stílað til menn sum til kvinnur.

Vit mannfólk eru sambært Joan blindir yvirfyri kvinnuliga tørvinum. Vit eru ótilvitaðir um, hvat kvinnan vil hava. Vit vita ikki, hvussu ymiskar seksuellu preferansurnar eru. Og vit duga ov illa at mogga. Ella "mokka", sum Joan tekur til, tá hon roynir seg á føroyskum og eftirfylgjandi láturin rungar í salinum.

Fyri Joan Ørting er orgasma ein mannarættur. Og tað eru alt ov nógvir menn, sum gloyma kvinnuna og hennara rætt til eisini at *koma*.

- Tað er bert ein lítil

## FAKTA

Joan Ørting er fødd í 1960 og útbúgvin sexologur, kognitivur terapeutur, life-coach og meditatiónslærari. Hon er brævkassaredaktørur á Ekstrablaðnum, hevur sjónvarpssendingar (seinasta var Sexskolen á TV3) og skrivar bøkur um kyns- og samlív. Hon hevur sína egnu sexolog-útbúgving og parterapi-útbúgving og starvast eisini sum privatur terapeutur

> *Tað er bert ein lítil minniluti av kvinnum, sum koma av vanligari inn-út samlegu*

> *Menn fáa sjokk, tá eg biði teir "minnast til" kvinnuna eftir, at teir sjálvir hava avgreitt sítt*